**FØROYA KÆRUSTOVNUR**
**FJØLMIÐLANEVNDIN**

Tórshavn: 26. mars 2015
J. nr.: 15/00015
(at tilskila í svari)
Viðgjørt: BL/

Kringvarp Føroya
Tils. Liljan Weihe
Postrúm 1299
110 Tórshavn

**Viðvíkjandi kæru til Fjølmiðlanevndina.**

Fjølmiðlanevndin hevur havt fund 12. mars 2015, har kærumálið um sendingina hjá Óla Breckmann á Rás 2 tann 4. juni 2014 var viðgjørt.

**Fjølmiðlanevndin metir, at hóast tað er møguligt at gera viðmerkingar til fleiri viðurskifti í kærdu sendingini vísandi til leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið, er ikki grundarlag fyri at finnast at hesum viðurskiftum. Trupulleikin í sendingini er í høvuðsheitum málburðurin hjá vertinum í sendingini. Málburðurin er ikki er í tráð við góðan fjølmiðlasið, og vísast kann til pkt. 3.8 og pkt. 4.1 í leiðreglunum. Nevndin hevur ikki fleiri viðmerkingar til sendingina, ella til tær viðmerkingar, sum eru førdar fram av Kringvarpinum.**

Avgerðin verður hjáløgd send tygum.

Vinarliga

Betzy Ludvig, løgfrøðingur

Avrit frá kvf.fo

UNDIR HORNABAKKA • POSTSMOGA 45 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 32 05 85 • TELEFAX 32 05 90 • TELDUPOSTUR: KAERUSTOVNUR@KAERUSTOVNUR.FO

**Avgerð**
**tikin av Fjølmiðlanevndini 12. mars 2015**
**Kærari: Kringvarp Føroya**
**Máls tal: 15/00015**

Kringvarp Føroya (KvF) hevur kært sending frá 4. juni 2014 hjá Óla Breckmann á Rás2.

Málið bleiv viðgjørt av Fjølmiðlanevndini, ið tók avgerð um at vísa málið til Rás2 at viðgera, vísandi til § 34, stk. 3 í lógini um fjølmiðlaábyrgd. Nú hevur KvF aftur vent sær til Fjølmiðlanevndina, tí KvF onki fættir frá Rás2 í hesum málið.

Fjølmiðlanevndin hevur vent sær til Rás2 fyri at fáa greiðu á, um Rás2 er sinnað at viðgera kæruna frá KvF. Tað hevur ikki hevur verið møguligt at fáa greitt svar viðvíkjandi hesum, og má niðurstøðan tí verða, at Rás2 ikki fer at taka avgerð í málinum. Hetta er sostatt grundarlagið fyri viðgerðina hjá Fjølmiðlanevndini.

**Kringvarp Føroya**
KvF førir fram, at sendingin hjá Óla Breckmann er í stríð við øll journalistisk prinsipp, so sum sakligheit, óheftni og konstruktiva og kritiska viðgerð av samfelagsmálum. Sendingin er ein long útspilling av Kringvarpinum og teimum, sum starvast á stovninum.

Avrit frá kvf.fo

Víst verður á hesi punkt í leiðreglunum:

Vísandi til pkt. 1.1. í leiðreglunum um óheftni verður ført fram, at verturin í sendingini, Óli Breckmann, á ongan hátt er óheftur. Hann er politiskur aktørur, og hevur í mong ár verið bæði løgtingsmaður og fólkatingsmaður fyri Fólkaflokkin. Tað sæst eisini í sendingini hjá honum, at tað eru sjónarmiðini hjá Fólkaflokkinum, sum verða løgd fram og vard. Sum dømi kunnu hesi brot hjá Óla Breckmann úr kærdu sendingini endurgevast:

13.37: "*...hendan útspekuleraða ráðagerðin inni í hesi eini redaksjónini hjá Kringvarpi og útvarpi. Tey hurraðu dúgliga um løgmann og Jørgen...*"

14.52: "*...fyri ikki at spilla sær spælið virkar tað í dag sum um, at Kringvarpið í útvarpstíðindunum heldur tátt, soleiðis at hurlivasin kann halda fram í morgin ella ovurmorgin, tá tey koma aftur at spilla Jørgen Niclasen út.*"

24.27: "*...hevði tú latið eitt mál fylt so nógv, sum hendan her jagstranin av Jørgen Niclasen hevur hesar síðstu mánaðirnar?*" (spurningur til Árna Gregersen)

40.44: "*...tá man hugsar um tær 52.000 kr. sammett við tær hundraðtals túsundavís av krónunum sum hesin her almenni fjølmiðilin hevur brúkt í lønum til at spilla í hesum føri Jørgen Niclasen út, Anfinn var tað einaferð og Bjarni Djurholm, hann bleiv rullaður í runu í sama fjølmiðli í mánaðvís, og eg vænti, at Johan Dahl, hann kann ikki vera langt aftanfyri, tá man hugsar um hansara lív í 90unum og 80ununum.*"

Vísandi til pkt. 1.2. og pkt. 3.2. um ávikavist at øll viðkomandi sjónarmið skulu lýsast, og at miðilin skal vera vandin í vali av heimildum, verður viðmerkt, at í umrøddu sending eru umframt vertin sjálvan tveir kritikarar av KvF og ein journalistur.

Bill Justinussen er løgtingsmaður fyri Miðflokkin, og flokkurin hevur sum aðalmál at privatisera KvF. Hetta kom m.a. fram í seinastu valskrá hjá flokkinum og í sambandi við eykajáttan til Kringvarpið til desember 2012.

Annfinn V. Hansen hevur verið løgfrøðingur hjá Jørgeni Niclasen, fíggjarmálaráðharra og formanni í Fólkaflokkinum í mong ár, og er partvís eisini partur av málinum, sum verður gjørt í sendingini. Nevniliga tíðindaflutninginum hjá KvF í sambandi við Tollmálið. Harafturat hevur Annfinn V. Hansen, orsakað av tíðindaflutninginum í KvF, mist eina milliónа uppgávu sum kanningarstjóri í sambandi við Skálfjarðartunnilsmálið. Eisini er Annfinn V. Hansen advokatur hjá P/f Seta, sum eigur garnabátin Anitu, sum KvF eisini hevur varpað kritiskt ljós á. Í sendingini fáa vit ikki at vita, hví hansara sjónarmið um "journalistikk ella karaktermorð" í KvF eru viðkomandi. Tvørturímóti kann hugsast, at Anfinn V. Hansen, umvegis sínar klientar, hevur orsøk til at tosa ilt um tíðindaflutningin í KvF fyri at reinsa seg og sínar klientar. Tað finnast nógvir løgfrøðingar í Føroyum, og ynskti verturin ein serfrøðing á økinum, so kundi hann valt ein annan enn júst Annfinn V Hansen, sum hevur ein beinleiðis leiklut í umrødda tíðindaflutningi í KvF. Altso hevur verturin ikki verið vandin í sínum vali av heimildum til hesa sending.

Árni Gregersen er journalistur og rekur portalin ting.fo. Hann er ikki opponentur til Bill Justinussen og Annfinn V. Hansen – og slett ikki til vertin sjálvan.

Tvørturímóti hevur verturin sína heilt greiðu fatan av KvF og teimum, sum starvast har.

19.20: *"Vit hava havt nógv dømi um, at journalistar hjá Kringvarpinum hava stillað upp. Serliga fyri tann eina flokkin, og tað er Tjóðveldi, tí tað er líkasum synonymt við KvF."*

Tí kann á ongan hátt sigast, at øll viðkomandi sjónarmið vóru lýst í sendingini. Heldur ikki hevur verturin verið vandin í sínum vali av heimildum. Tvørturímóti tykist tað sum, at verturin hevur ómakað sær við at finna heimildir, sum stuðla uppundir hansara egnu fatan av Kvf og teimum, sum starvast á stovninum.

<u>Vísandi til pkt. 2.1.</u> um integritet og trúvirðið verður viðmerkt, at sum nevnt í pkt. 1, so er Óli Breckmann ein politiskur aktørur. Hann hevur sterkt tilknýti til Fólkaflokkin, sum situr við valdinum í Føroyum, og eigur tí sambært leiðreglunum ikki at gera eina sending, sum beinleiðis viðgerð førda politikkin í landinum. Til tað hevur hann alt ov tætt tilknýti til politisku skipanina. Leiðreglurnar leggja upp til undir pkt. 1, at fjølmiðlar eru politiskt óheftir og hava skyldu til at øll viðkomandi sjónarmið verða lýst. Ein propagandasending, sum hendan hjá Óla Breckmann, stríðir móti andanum í leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið, og eigur tí als ikki at verða útvarpað. Propaganda er nakað vit síggja í valtilfari, á heimasíðum hjá politiskum aktørum og øðrum samfelagsaktørum. Ikki nakað, vit sum miðlar skulu varpa út sum sannleiksorð.

Um so er, at Fólkaflokkurin ynskir sær eina propagandasending á einari privatari útvarpsrás, so vildi KvF mett, at tað á sama hátt sum við lýsingartilfari greitt skal tilskilast, at talan er um propaganda áðrenn, undir og eftir sendingina.

<u>Víst verður til pkt. 2.2.</u> í leiðreglunum um, at fjølmiðlafólk ikki eiga at átaka sær uppgávur, arbeiði o.s.fr., ið kann skapa iva um endamálið við kunningaruppgávuni. Tey eiga ikki at koma sær í støður, har ivi kann sást um teirra trúvirði, og tey eiga ikki at gáa um viðurskifti, ið kunnu ávirka gegnið hjá tí einstaka fjølmiðlafólkinum. Viðvíkjandi viðmerkingunum verður víst til pkt. 1 og 3.

<u>Viðvíkjandi pkt. 4.1.</u> um sakligt og umhugsað innihald verður viðmerkt, at verturin leggur við sínum retorikki upp til útspilling móti navngivnum starvsfólkum í KvF, tá hann samanber tey við "lynch-mobs", og sigur, at tey í KvF brúka "Ku Klux Klan Metodir".

27.25: *"Lynch-mobs ella Ku Klux Klan metodan..."*

Avrit frá kvf.fo

Eftirfylgjandi tekur verturin upp aftur:
28.25: *"Hesin her lynch-justitsurin, sum tey brúka uppi í Sortudíki, er jú fullkomiliga...altso hetta er uttanfyri alt, alt mark... Og tað er onki kontroll... Tað er onki tamarhald á hasum fólkunum. Nú hugsi eg serliga um hattar har* ***sjakalkoplið****, altso hetta er the wolfpack, sum velja sær eina sebra burturúr flokkinum, og so forfylgja tey hesi sebraini, inntil hon liggur, ha? Kundi Jørgen ikki stevnt, og so fingið tey til at hildið munn í hvussu er, meðan sakin gongur? Ella skal Jørgen stevna, hvat vildi tú hildið, altso skal Dia Midjord í spjellið, ella skal Liljan Weihe í spjellið? Hvør annar er har, sum kundi farið sama veg?"*

Hetta er ræðandi retorikkur, at samanbera KvF og fólkið, sum starvast hjá KvF, við høgraekstremistiskar rørslur, ið høvdu til endamáls at týna, og í summum førum myrða minnilutar.

Tað er heilt grundleggjandi fyri fjølmiðlaarbeiði, at fjølmiðlar siga og skriva satt. Men her er sendingin eisini heilt av leið. Til dømis sigur verturin, at KvF krevur inn 80-90 mió. kr. um árið frá borgaranum. Hetta passar ikki, og hevði verturin ómakað sær so mikið sum at kanna málið, so hevði hann vitað, at inntøkurnar av kringvarpsgjaldinum í 2013 vóru 46,8 mió.kr. Altso helvtin av tí, verturin legði fram sum fakta í sendingini. Eisini sigur verturin, at KvF krevur 4.600 kr. frá tí føroyska borgaranum um árið. Rætta upphæddin er 3.600 kr. v. mvg (til landskassan).

KvF heitir á Fjølmiðlanevndina at viðgera hesa kæru, men eisini at koma við hugleiðingum um, hvat miðlar kunnu borðreiða við. Er tað til dømis í lagi, at ein politiskur aktørur, í hesum føri ein fólkafloksmaður, hevur eina politiskt hefta útvarpssending á einari útvarpsrás, uttan at tað greitt verður tilskilað, at talan er um politiskt propaganda?

Harafturat vísir KvF á, at teimum vitandi er ongin redaktørur á sendingini hjá Óla Breckmann. Tað er beinleiðis brot á § 5 í lógini um fjølmiðlaábyrgd. Tað er heldur ikki greitt, hvør ábyrgdar-útvarpsstjórin er á Rás 2. Tí er tað ringt at staðfesta, hvør hevur evstu innihaldsligu ábyrgdina av Rás 2.

**Lógargrundarlag**
§ 43 í løgtingslóg nr. 45 frá 16. mai 2006 um fjølmiðlaábyrgd, sum broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2007.

Leiðreglur um góðan fjølmiðlasið frá 14. mai 2008.

**Avgerðin hjá Fjølmiðlanevndini**
Til at viðgera hetta mál var Fjølmiðlanevndin mannað við Annu Katrin Matras, forkvinnu, og nevndarlimunum Jan Sjóstein og Ingolf S. Olsen. Jógvan Jespersen var serliga tilnevndur at viðgera málið, vegna ógegni hjá nevndarliminum Liljan Weihe og varaliminum Eiriki Lindenskov.

Sum longu nevnt er hetta mál viðgjørt áður, og bleiv tá víst til Rás2 at viðgera málið í fyrstu atløgu. Av tí at KvF onki hevur frætt frá Rás2 síðani, hevur KvF aftur vent sær til Fjølmiðlanevndina, og biðið um at kæran verður viðgjørd. Fjølmiðlanevndin hevur síðani fleiri ferð vent sær til Rás2 fyri at fáa greiðu á, um Rás2 er sinnað at taka avgerð í málinum. Tað hevur ikki hevur verið møguligt at fáa greitt svar viðvíkjandi hesum, og má niðurstøðan tí verða, at Rás2 ikki fer at taka avgerð í málinum. Hetta er sostatt grundarlagið fyri viðgerðina hjá Fjølmiðlanevndini.

Spurningurin er tí í fyrstu atløgu, um nakar løgfrøðiligur trupulleiki er í mun til at viðgera málið, tá Rás2 sambært lógini skal viðgera málið í fyrstu atløgu.



Avrit frá kvf.fo

Tá talan er um fleiri kærustig, er tað ein relevantur spurningur í hesum føri, um man kann fara uttanum Rás2, sum kærustig, og beinleiðis til Fjølmiðlanevndina, ið er kærustigi yvir Rás2.

Sambært § 34, stk. 3 í lógini um fjølmiðlaábyrgd skal tann, sum heldur seg líða órætt vegna brot á stk. 1, framt av Kringvarpi Føroya ella aðrari kringvarpsstøð, sum hevur sendiloyvi sbrt. kringvarpslógini, kæra til hesar fjølmiðlar innan 4 vikur eftir, at upplýsingarnar eru almannakunngjørdar. Avgerðin hjá hesum fjølmiðlum kann kærast til Fjølmiðlanevndina innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið avgerðina.

Tað framgongur av viðmerkingunum til hesa grein í lógaruppskotinum, at orsøkin til hesa serligu reglu er, at hesi sambært kringsvarpslógini hava skyldu at viðgera eina tílíka kæru, og tí skal ein møgulig kæra sendast hesum fyrst og ikki fjølmiðlanevndini.

Viðvíkjandi skyldini hjá fjølmiðlum at viðgera tílíkar kærur skal vísast til § 22, stk. 2 í kringvarpslógini. Her er tó ongin áseting um, hvør fylgjan er, um ein fjølmiðil ikki heldur sína skyldu at viðgera og taka avgerð í kærumálum.

Í hesum føri er støðan tann, at kærarin onki hoyrir frá Rás2, og eisini hevur Fjølmiðlanevndin ikki kunnað fingið greið boð, um Rás2 ætlar sær at viðgera málið. Í hesum føri eru ongi atlit, sum tala ímóti, at Fjølmiðlanevndin viðger málið. Fjølmiðlanevndin hevur tí avgjørt at viðgera málið.

Viðvíkjandi spurninginum um kærufreistina kann viðmerkjast, at hendan upprunaliga er hildin, tí KvF upprunaliga kærdi málið rættstundis til Fjølmiðlanevndina, sum síðani vísti málið til Rás2 til viðgerðar. Sama kæran er nú enn eina ferð latin Fjølmiðlanevndini, tí tað ikki hevur verið møguligt hjá KvF at fáa Rás2 at viðgera málið. Ásetingar um kærufreistir eru ikki galdandi í hesum føri, og eru tær tí heldur ikki ein trupulleiki í mun til at viðgera kæruna.

Sum tað longu framgongur av málinum hevur Rás2 ikki viðgjørt og tikið avgerð í málinum. Vísast skal á, at Rás2 hevur skyldu at viðgera og taka avgerð í kærumálum um rásina. Hetta framgongur av § 22, stk. 2 í Kringvarpslógini og § 34, stk. 3 í lógini um fjølmiðlaábyrgd. Hóast ongar ásetingar eru um avleiðingar, um hendan skyldan ikki verður hildin, sømir tað seg ikki, at Rás2 ikki virðir ásetingarnar og tað kæruskipan, sum er á fjølmiðlaøkinum.

Hetta er eisini ein av orsøkunum til, at so long tíð er gingin, áðrenn Kringvarpið hevur fingið avgerð í hesum málið, og er hetta ikki í lagi. Tann langa viðgerðartíðin er tó eisini grundað á, at nevndin ikki var varug við, at tað upprunaliga kærumálið átti at vísast til Rás2 til viðgerðar, fyrr enn málið mestsum var liðugt viðgjørt av Fjølmiðlanevndini. Hetta harmast nevndin um.

Viðvíkjandi sjálvum kærumálinum kann at byrja við viðmerkjast, at leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið fevna um nógv ymisk viðurskifti og eru sera elastiskar. Tá metast skal um fjølmiðlamál kann tí oftast vísast til fleiri leiðreglur, sum eftir eini strangari meting ikki eru hildnar ella møguliga ikki eru hildnar. Soleiðis er eisini í hesum máli, og umráðandi er tí ikki at leggja eina ov stranga linju, men at halda seg til tað, sum grundleggjandi er avgerandi í málinum í mun til góðan fjølmiðlasið.

Viðvíkjandi sjálvum kærumálinum kann at byrja við viðmerkjast, at leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið fevna um nógv ymisk viðurskifti. Tá metast skal um kærumál er ofta møguligt hjá nevndini at gera viðmerkingar til fleiri punktir í leiðreglunum, tó uttan at øll punktir hava avgerandi týdning fyri, um góður fjølmiðlasiður er hildin. Neyðugt er at meta yvirskipað um málini, og nevndin heldur seg sum útgangsstøði til tey punktir í leiðreglunum, sum

Avrit frá kvf.fo

grundleggjandi eru avgerandi í mun til góðan fjølmiðlasið, heldur enn at viðgera øll møgulig punktir í leiðreglunum ella, at viðgera smálutir í einstøku kærupunktunum út í æsir.

Atlitið til talufrælsi hevur eisini við sær, at stórt rásarúm er í mun til evnir og áskoðanir, sum verða framførd, og nevndin skal vera varin við ikki at avmarkað hetta.

Í tí kærdu sendingini verður KvF viðgjørt, herundir teirra leiklutur sum alment Kringvarp, og teirra viðgerð av ávísum málum, serliga tollmálinum viðvíkjandi Jørgen Niclasen.

KvF, sum er kærarin í hesum máli, skal sum fjølmiðil tola at verða viðgjørt av øðrum miðlum. Metast má eisini um viðgerðina av KvF í sendingini hjá Óla Breckmann í tí høpi, at KvF sjálvt hevur lagt eina harða linju m.a. í viðgerðini av tollmálinum viðv. Jørgen Niclasen, og at eitt ávíst stríð hevur verið millum miðlarnar júst av hesi orsøk.

Evnini í sendingini hjá Óla Breckmann eru tí relevant at viðgera, og grundarlag er fyri teimum áskoðanum, sum koma fram. Linjan er hørð, og hetta má Kringvarpið í ein ávísanum mun eisini tola.

Hinvegin er málburðurin hjá vertinum Óla Breckmann í sendingini ómentaður/óhøviskur, ósakligur og til tíðir er orðavalið langt uttan fyri mark. Her verður serliga hugsað um tilvísingina til Ku Klux Klan-metodir og líknandi úttalilsir. Hetta er ikki í tráð við leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið og vísast kann til punkt 3.8 og punkt 4.1 í leiðreglunum.

Viðv. spurninginum um óheftni eru ásetingarnar um hetta í leiðreglunum rættaðar móti sjálvum miðlinum heldur enn tí einstaka miðlafólkinum. Hóast Óli Breckmann ikki er óheftur politiskt, hevur hetta ikki við sær, at sendingar hansara hava við sær, at spurnartekin kann setast við óheftni hjá Rás2. Her hevur slagið av sending sjálvsagt eisini týdning. Nevndin heldur tí ikki grundarlag vera fyri at gera viðmerkingar til spurningin um óheftni, hóast at grundarlagið fyri sendingini uttan iva kundi verið meira objektivt.

**Samanumtikið metir nevndin, at hóast tað er møguligt at gera viðmerkingar til fleiri viðurskifti í kærdu sendingini vísandi til leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið, er ikki grundarlag fyri at finnast at hesum viðurskiftum. Trupulleikin í sendingini er í høvuðsheitum málburðurin hjá vertinum í sendingini. Málburðurin er ikki er í tráð við góðan fjølmiðlasið og vísast kann til pkt. 3.8 og pkt. 4.1 í leiðreglunum. Nevndin hevur ikki fleiri viðmerkingar til sendingina ella til tær viðmerkingar, ið eru førdar fram av KvF.**

Fjølmiðlanevndin

f. Betzy Ludvig
Anna Katrin Matras, forkvinna

Betzy Ludvig, skrivari

Avrit frá kvf.fo